Profil Rejser:

## Stórur vøkstur í Føroyum

FERÐING
*www.sparikassin.fo*

Londini í Útnorðuri eru eftir øllum at døma eitt vakstrarøki hjá danskari ferðavinnu. Soleiðis roknar størsti danski fyriskiparin av frítíðarferðum, Profil Rejser, við at senda munandi fleiri fólk til útnorðurlondini komandi ár samanborið við í ár. Tað upplýsir Take Off, skrivar www.sparikassin.fo

Profil Rejser hevur júst gjørt eina nýggja stóra ferðaskrá við 64 síðum, har Føroyar, Ísland og Grønland eru savnað saman, og vónirnar til ferðamálini eru góðar: 33 prosent fleiri ferðafólk til Føroya, átta prosent fleiri til Íslands, og 10 prosent fleiri ferðandi skulu sendast til Grønlands. Í ár sendi ferðavinnufyritøkan 1.000 fólk til Føroya, 1.000 til Íslands, og heili 3.000 ferðafólk vitjaðu Grønland gjøgnum Profil Rejser.

Danska ferðavinnufyritøkan marknaðarførir tey trý útnorðurlondini sum »Norðuratlantisk Ævintýr«, og nú verða útnorðurlondini fatað sum sonevnd »heilárs-ferðamál«, meðan tey higartil hava verið »sesongferðamál«.

Í Føroyum bjóðar Profil ferðafólkum sínum uppihald á hotellum, summarhúsum, guesthouses, og eisini er tilboð um at koyra sjálvi kring oyggjarnar.

Nevnast skal, at norsku oyggjarnar, Svalbard, eru við í teimum norðuratlantisku ævintýrunum hjá Profil Rejser. Hvørt ár ferðast umleið 80.000 fólk við fyritøkuni.

Kelda: heimasíðan hjá Føroya Sparikassa www.sparikassin.fo

# Hugin gjørt samstarvsavtalu við Markeds Consult

VIRKISRÁÐGEVING
*Tíðindaskriv*

Føroyska virkisráðgevingarfelagið Hugin spf. hevur gjørt eina samstarvsavtalu við danska ráðgevingarfelagið Markeds Consult, sum ger tað møguleikt at bjóða nýggjar spennandi tænastur.

Markeds Consult fæst serliga við at gera kanningar um kunda- og starvsfólkanøgdsemi fyri fyritøkur, bæði privatar og almennar. Fyritøkan er ein tann fremsta danska ráðgevingarfyritøkan innan fyri máting, rapportering og ráðgeving av tí mest virðismikla aktivinum - nevnliga tey immateriellu.

Markeds Consult er m.a. við til at framleiða tað leiðandi evropeiska nøgdsemis-indexið fyri starvsfólk, European Employee Index.

Nú hevur Hugin tískil møguleika at bjóða føroyskum fyritøkum og almennun stovnum hesa tænastu.

Grundarlagið undir samstarvsavtaluni er, at Hugin og Markeds Consult hava ta hugsan, at gjøgnum samstarv eru vit sterkari og kunnu nýta okkara ymisku vitan og førleika í hesum samstarvi til virðisskapan fyri kundar okkara.

Tað gerst alsamt meira neyðugt og vanligt at máta nøgdsemi hjá sínum starvsfólkum og sínum kundum. Hetta fyri at fáa eina mynd av, hvar fyritøkan skapar virði fyri kundar og starvsfólk, og hvar fyritøkan skal seta eyka inn fyri at betra



*Hugin Steinbjørn Hardlei*

seg. Eitt framkomið og kappingarført vinnulív krevur, at leiðslurnar eru dugnaligar at taka tær røttu avgerðirnar við tí rætta grundarlagnum. Við at gera hesar nøgdsemiskanningar javnan kunnu fyritøkurnar síggja, um nøgdsemið verður betri, har tað er neyðugt.

Við hesi tænastuni ber eisini til at samanbera ("benchmarka") síni nøgdsemisúrslit við úrslitini í somu vinnugreinum í øðrum londum, eitt nú Norðurlondum. Markeds Consult hevur hollar royndir at gera tílíkar nøgdsemiskanningar, og niðurstøðan er púra greið: Nøgdir kundar og nøgd starvsfólk geva fyritøkunum búskaparligan vinning.

Umframt at skipa fyri kanningini og fáa úrslitið til vega, hjálpir Hugin eisini við at veita serkøna hjálp við at lýsa og viðgera kanningarúrslitið. Hetta fyri at umseta kanningarúrslitið til ítøkiligar handlingsætlanir við tí endamálið at betra um nøgdsemi hjá kundunum og starvsfólkunum.

Vit eru sera fegnir um at hava fingið hetta samstarv í lag, og vænta okkum nógv av samstarvinum okkara kundum at gagni.

# Oljuráðstevnan Offshore Faroes 2005 verður 18. januar

**Úrslitið frá Rosebank /Lochnagar er sera týdningarmikið sigur Gregory T. Himes, Vice President of Global Exploration hjá Statoil. Hann vónar, at fundið fer at hava við sær, fleiri góð leitiúrslit bæði í bretskum og føroyskum øki, skrivar Vinnuhúsið í dag. Gregory T. Himes verður ein av framløgufólkunum á oljuráðstevnuni, sum í ár verður hildin týsdagin 18. januar í Norðurlandahúsinum**

OLJURÁÐSTEVNA

Oljuvinnufelagið hevur valt at býta oljuráðstevnuna upp í tveir partar. Fyrri partur snýr seg um oljuleiting á føroyskum øki og seinni partur um, hvat skal til fyri at tryggja vælferð Føroya.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum setir ráðstevnuna. So verður tikið fætur á oljupartinum. Av framløgum verður millum annað Sigurð í Jákupsstovu, stjóri í Oljufyrisitingini. Hann fer at greiða frá aðru loyvisrundu á føroyska økinum, millum annað hvørji oljufeløg fingu leitiloyvi, um arbeiðsskránna hjá teimum og hvørjar framtíðar vónirnar eru.

Gregory T. Himes, Vice President of Global Exploration frá Statoil fer síðani at greiða frá teirra áskoðan um framtíðar olju- og gass leiting. Gregory T. Himes hevur sagt, at úrslitið frá Rosebank/Lochnagar er sera týdningarmikið fyri arbeiðið hjá Statoil í hesum økinum. Hann vónar at fundið fer at hava við sær fleiri góð leitiúrslit bæði í bretskum og føroyskum øki.

Eisini Dave Lewis, Exploration Manager hjá Chevron Texaco fer at greiða frá hvørjar møguleikar tey síggja í Atlantsmótinum.

Statoil og Chevron Texaco hava júst kunngjørt at feløgini hava funnið eina stóra nøgd av olju og gassi í Rosebank/Lochnagar feltinum, har Chevron Texaco er fyristøðufelag og Statoil eigur 30%. Feltið liggur beint við føroyska markið. Bæði Statoil og Chevron Texaco hava søkt um leitiloyvi í aðru loyvisrundu í Føroyum.

Føroya Kolvetni var millum mest aktivu feløgini við seinastu loyvisrundu í Bretlandi. Eisini hevur felagið sókt um loyvi í aðru loyvisrundu í Føroyum. Graham Stewart, stjóri fer at greiða frá teirra virksemi í økinum. Eisini fer Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, at gera status yvir teirra virksemi í Bretlandi.

Síðst í hesum parti fara Petur Joensen, deildarstjóri í Oljufyrisitingini og Regin Hammer, fyrisitari hjá FOÍB at greiða, hvussu pengarnir til førleikamenningina eru brúktir og hvat er komið burturúr.

Næsti partur av oljuráðstevnuni er ikki minni áhugaverður. Her spyrja vit, hvussu tryggja vit vælferð Føroya í framtíðini?

Vit leggja út við íblástri frá øðrum londum. Fyrst fer Thorvaldur Gylfason, professari í búskapi við Universitetið í Íslandi at greiða frá, hvussu støðan er í Íslandi og hvat tey hava gjørt fyri at fáa búskapin minni tengdan at fiskivinnuni og harvið fingið eitt meira fjølbroytt vinnulív.

Somuleiðis fer Torger Reve, rektari og professari við BI Handilsháskúlan í Stavanger at tosa um at leggja ætlanir fyri vøkstur í einum samfelag, sum er so nógv merkt av einum tilfeingisbúskapi.

Johnny í Grótinum, cand. Polit, Føroya Sparikassi, fer síðani at tosa um vinnupolitik og búskaparvøkstur í Føroyum. Zvonko Mrdalo, búskaparfrøðingur hjá Hagstovu Føroya fer at vísa á, at tað ikki er bara fiskur føroyingar útflyta, men eisini tænastur av ymiskum slag. Hetta vísur gjaldsjavnin hjá Føroyum, sum júst er gjørdur. Síðsta framløga hevur Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland. Hann fer at vísa á hvørjar forðingar hann sær í føroyska búskapinum fyri nýskapan. Hann fer eisini at koma við eini ætlan fyri, hvussu vit kunnu koma burtur frá hesi forðing.



*Savnsmynd*